# Týdningarmikið stig í føroyskari vi

**– Vit skriva vinnulívssøgu í hesum døgum. Hetta er eitt fyrsta stig burtur úr tí stirvna fíggingarmynstrinum, sum hevur bundið føroyskt vinnulív niður alt ov leingi. Føroyskt vinnulív má sum frálíður sleppa fram at somu fíggjarskipanum sum kappingarneytar í londunum um okkum. Hetta er ein avgerandi fyritreyt fyri vinnuligari menning í Føroyum segði Kjartan Hoydal, nevndarformaður í Atlants Kolvetni, tá hátíðarhald varð hildið í Havn mikudagin í sambandi við, at felagið varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum**

VINNLÍVSSØGA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Mikudagurin 15. Juni vil vera ein merkisdagur fyri mong í Føroyum. Tí henda dagin fór føroyski virðisbrævamarknaðurin at virk og oljufelagið Atlants Kolvetni varð skrásett á VMF. Tað var nevndarformaðurin í Atlants Kolvetni, Kjartan Hoydal, sum beyð øllum vælkomin til móttøku í samband við, at Atlants Kolvetni tók stigið sum fyrsta føroyska felagið at fara á íslendska/føroyska virðisbrævamarknaðin.

Hann vísti á, at hetta er enn eitt stig í einari miðvísari ætlan hjá felagnum, eitt týdningarmikið stig ikki bert fyri felagið men eitt stig í føroyskari vinnulívssøgu.

– Nógv er vorðið greiðari viðvíkjandi føroyskari oljuvinnu, síðani karmarnir vóru skaptir í nítiárunum og semjan við Bretland setti sjøtul á. Føroyskir myndugleikar valdu tá tann eftir okkara tykki betra lutin, ikki at fara inn á leiðina borin almenn oljufeløg, sum hevur verið gjørt so nógva staðni.

Ístaðin tók føroyskt vinnulív sjálvt leiðsluna og skapaði eitt felag, sum hevur verið til frama fyri føroyskt vinnulív og latið upp fyri 3000 íleggjarum, so felagið er væl og virðiliga rótfest í føroyska samfelagnum. Nógv er at læra her. Tá røttu karmarnir eru skaptir klárar vinnulívið at finna fram til menning og vøkstur. Vakstrarøki vera ikki funnin við politiskum avgerðum men við vinnuligum virksemi segði Kjartan Hoydal.

Hann visti víðari á, at fyrsta takið var at fáa eina avtalu við eitt av teimum samtøkum, sum bjóðaðu seg fram seinast í nítiárunum, og eftir samrøður við fleiri samtøk og drúgvar samráðingar fekst ein sera góð avtala til vega við Faroes Partnership, sum gjørdi tað møguligt hjá Atlants Kolvetni at hegna av váðan og taka lut í fyrsta útbjóðingarumfari undir Føroyum og fyrstu loyvun-




*Petur Holm, stjóri í Kaupthing segði, at tað hevur verið drúgvt og langtligt arbeiði at koma hertil*

*Mynd Jens K. Vang*

# Málið er ikki skrásetingin – men tað hon k

**– Vit eru samlað fyri at feira og heiðra, at Atlantic Petroleum er vorið skrásett, men er tað týdningarmikið at leggja sær neyvt í geyma, at hetta ikki er endin. At málið fyri Atlantic Petroleum við hesum ikki er nátt. Málið er ikki skrásetingin, men ta, sum ein skráseting kann geva Atlantic Petroleum segði stjórin í Kaupthing, Petur Holm, tá Atlantic Petroleum mikudagin varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum**

VIRÐISBRÆVA-MARKNAÐUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Petur Holm vísti á, at tað eru skjótt 10 ár síðani, at innleiðandi arbeiðið til ein føroyskan virðisbrævamarknað byrjaði, tá ein bólkur av áhugaðum, sum umboðaðu nøkulunda somu feløg, sum í dag eru partaeigarar í VMF, gjørdu eina frágreiðing um eginpeningsviðurskifti í føroysku vinnunum og um hvussu ein føroyskur virðisbrævamarknaður kundi skipast.

– Arbeiði fram móti einum veruligum marknaði hevur verið drúgvt og langligt og part av tíðini er nærum einki hent, hóast allir partar vóru á einum máli um, at ein føroyskur virðisbrævamarknaður kundi fáa stóran týdning fyri føroyskt vinnulív og føroyskan búskap.

Nú er fyrsta skrásetingin endiliga veruleiki. Langt um langi er tann dagurin upprunnin, sum flestu teirra, ið hava luttikið í arbeiðinum fyri einum føroyskum virðisbrævamarknaði, hava bíðað eftir.

### Tillukku

Petur Holm ynskti Atlantic Petroleum tillukku. -Tit eru nú komnir gjøgnum nálareygað og eru vorðnir skrásettir á VMF ella á ICEX og tykkara innsatsur í felagnum verður frá nú av mettur og vigaður í mun til onnur skrásett feløg. Avleiðingarnar av tykkara avgerðum í leiðslu og nevnd fara frá nú av at síggjast skjótt aftur á marknaðinum, har verandi og møguligir komandi partaeigarar, íløgubankar, partabrævagreinarar fara at gera sínar niðurstøður. Men sum nakað nýtt kunnu hesir nógv lættari enn áður fella dóm beinanvegin - á marknaðinum.

Petur Holm helt tað ikki vera løgið, at tað júst er AP, sum er fyrsta felagið, ið er vorðið skrásett, tí Atlantic Petroleum er eitt av heldur fáum føroyskum feløgum, sum hevur altjóða ambitiónir, og sum forfylgir hesum ambitiónum. Og hann helt fram:

– Fyri okkum á Kaupthing hevur tað verið ein heiður og gleði sum limur av ICEX at hava kunna staðið aftanfyri at skráseta Atlantic Petroleum á føroyska virðisbrævamarknaðinum. Serstakliga, tí tað er tað fyrsta felagið. Vónandi verða tað skjótt onnur feløg, sum fylgja hesum. Tað hevur eisini verið ein heiður at standa fyri at skráseta tað fyrsta ikki íslendska felagið á ICEX.

Stjórin í Kaupthing vísti á, at vit eru samlað fyri at feira og heiðra, at AP er vorið skrásett, so er tað týdningarmikið at leggja sær neyvt í geyma, at hetta ikki er endin. At málið fyri Atlantic Petroleum við hesum ikki er nátt. Málið er ikki skrásetingin, men ta, sum ein skráseting kann geva Atlantic Petroleum.

– Tað er týdningarmikið at hava eitt endamál við skrásetingini. Tað hevur Atlantic Petroleum. Teir vilja gera partabrøvini hjá uml. 3.000 partaeigarum umsetilig og harvið sjónliggera ta virðishækking, sum er skapt í felagnum. Men harafturat vilja teir eisini brúka marknaðin til at náa málum um vøkstur.

Skrásetingin í morgun er bara ein innleiðing til eitt størri arbeiði og ikki endin á arbeiðinum, sjálvt um tað at blíva skrásettur er eitt stórt arbeiði í sjálvum sær.

### Hyggja frameftir

Nú Atlantic Petroleum er skrásett á føroyska virðisbrævamarknaðinum hevur tað týdning áhaldandi at hyggja frameftir og hava greiðar ætlanir fyri:

- Hvat AP skal fáa burturúr skrásetingini
- Lættari atgongd til kapital
- Áhaldandi virðisseting av felagnum og harvið partabrøvunum
- Møguleika fyri verandi partaeigarar at selja síni partabrøv og harvið staðfesta møguligan vinning
- Gera felagið meira sjónligt
- At tryggja, at tað gerst lætt at handla partabrøvini